
*Jógvan Sofus Ferjá sum smádrongur*


*Dinnafía og Jógvan Sofus sum ung*


*Jóhan í Blásastovu var pápi Jógvan Sofus*


*Barnaheimið hjá Dinnufíu*


*Húsini hjá Jógvan Sofus og Dinnufíu við turkiløgum*

grannahúsinum, í Hoygarðinuum, sum plagdi at ganga so nógv inni hjá okkum. Tvær systrar doyðu á Rætt. Tann eldra, Kristina, doyði í 1934, 22 ára gomul, og tann yngra, Fía, doyði í 1940, 24 ár gomul. Eg var dupult systkinabarn teirra.

Eisini Kristoffur í Sámalstovu, beiggi Kristinu Súsonnu, doyði av tuberklum. Hann var eisini systkinabarn mítt.

## Tøting

Tøting var eisini ein fastur táttur í bygdarlívinum. Ullin var grundarlagið fyri hesum, og hon varð karðað, spunnin, bundin og vovin til klæði. Skipstroyggjur vóru bundnar í hópatali, og hetta var ikki minst undir krígnum.

Vit høvdu komfýr heima. Eg minnist bara eitt hús, sum hevði fýrstað. At lýsa heima við høvdu vit petroleumslampur. Tað sum kallaðist storm king, ið virkaði eins og ein primus og skuldi pumpast, kom ikki fyrr enn seinni. At kóka við var eisini primussur brúktur.

## Telefon og vatn

Telefonin kom longu í 1907 til Gjáar, og hevur Gjógv verið millum tær fyrstu bygdirnar at fáa henda hentleikan. Fyrsta telefonin í Føroyum kom í 1906. Fyrstu húsini við telefon var Ólastovu. Hetta var í húsunum, har Jákup Pauli var úr. Pápi Jákup Paula var Poul Biskopstø. Hann var ættaður úr Klaksvík, sum greitt hevur verið frá fyrr. Her var telefonin í 9-10 ár. Í 1916 fór telefonin niðan á Heyggj til Dánjal Klein. Tá ið hon fór haðani, fór hon til Óla Debes, og her var hon alla mína tíð. Vatnið kom inn í húsini í 1905, og var hetta bara fá ár eftir, at tað kom í húsini í Havn.

## Prestar

Tað var bert ein prestur í Eysturoynni, og hann var á Nesi. Hann hevði nógvar kirkjur at røkja, so tað var langt ímillum, at hann kom. Kirkja kom ikki við Gjógv fyrr enn í 1929, áðrenn tað var Funningur kirkjubygd fyri Gjógv.

Tá ið prestur kom til Funnings, komu samstundis messuboð til Gjáar. Farið varð síðan til gongu til Funnings í kirkju. Okkurt viðføri mátti havast við, sum til dømis altarsklæðini, ið vóru havd í eini eskju. Í Funningi høvdu vit føst hús at fara inn í, har vit vanliga fingu ein bita og eisini møguleika fyri at skifta klæðir. Nógv Gjáarfólk fóru inn hjá Sjúrða hjá Haraldi, mamma hansara var slektað frá Gjógv. Tað var eitt vælahús. Men fólkini her eldust og gjørdust verri fyri at taka ímóti fólki. Tá fóru tey á Rætt og omma í Jákupsstovu at halda til hjá Osvaldi og Karolinu. Tað kann verða nevnt her, at Karolina var systir tann eldra Knút skómakaran í Havn og fastir »yngra Knút«. Hon var eisini systir Fíu Egholm og Nellu, fyrru konu »Keisaran«, sum eisini búðu í Havn. Ein sonur Karolinu og Osvald var Jóhannes skómakarin í Fuglafirði, ið doyði fyri kortum, og dóttirin Malla gjørdist 100 ár.

Karolina og omma í Jákupsstovu vóru trímenningar, og Osvald var í ætt við abba á Rætt. Mamma og pápi fóru yvir til Eiðis-Siggu og Kristian, bóndan. Eiðis-Sigga og pápi vóru trímenningar.

Men prestur kom onkuntíð til Gjáar at bíræetta tey, sum ikki orkaðu til Funnings.

Eg minnist, at omma á Rætt lá í seingini, og at prestur var uppi á loftinum, og tað sama var við øðrum gomlum í bygdini.

Tá ið fólk doyðu við Gjógv, vórðu tey, um veður var til tess, førd við báti til Funnings at verða jarðað. Annars vóru tey borin. Hetta minnist eg ikki, men Jógvan Sofus minnist tað, tí hann er fýra ár eldri. Tey síðstu fólkini frá Gjógv, sum vórðu jarðað í Funningi, doyðu í 1917.

Onnur var Marin Sofía, mamma Drikku, sum gjørdist 105 ára gomul. Hon doyði á Fløtti hjá dóttrini. Hin var Súsanna Malena, kona Stovu-Pól. Tær fóru til gravar dag um dag.

Tá kom kirkjugarður við Gjógv og var hetta fitt, áðrenn kirkjan kom. Í 1918 doyði eingin við Gjógv, og í 1919 varð fyrsta fólk jarðað við Gjógv. Hetta var kona Kristian pápabeiggja, Marin Kristianna, ið var 39 ára gomul.

Jógvan minnist, tá ið abbi hansara Jógvan og Poul Biskopstø vóru jarðaðir. Hetta var í 1916. Jógvan er føddur á vári í 1913 og abbi hansara doyði á heysti. Poul doyði á sumri. Pápi bygdi í 1916. Avlop av húsaviðinum fingu tey til kistu. Hetta var jú undir 1. heimskríggi, tá var so ringt at fáa tilfar. Abbi á Rætt og Jóhan í Nýggjustovu vóru fastir kistusmiðir. Teir vóru eisini húsasmiðir.

So vórðu líkini borin til Funnings, tá tey ikki kundu førast. Bygdarfólkið, sum ikki fór við til Funnings, plagdi at fylgja heim á Heygarnar, einar 400 metrar frá húsunum.

Hetta var sjálvsagt ein tung byrða, so teir vóru tvey hold av berarum, tilsamans 16 mans, sum skiftust.

## Barbustova

Tað komu tvær systrar úr Barbustovu í Syðrugøtu til Gjáar. Omma Jógvan, Súsanna Frederikka, var onnur teirra, og hin æt Elspu Lena.

Tann eldra var Súsanna Frederikka, og man Elspa Lena so vera komin til systur sína og hevur so funnið drong. Tær vóru døtur Barbu av Blankskála og Pætur í Barbustovu.

Súsanna giftist við Jógvan Joensen í Blásastovu, og tey fingu 5 børn. Yngst av teimum var Jóhan, pápi Jógvan Sofus.

Elsebeth Elena giftist við Klæmint Joensen í Nýggjustovu. Tey fingu fýra børn.

Undan teimum báðum var Jógvan í Barbustovu, beiggi